RIMMAR ÚTSØLA

Byrjar hósdagin 13. januar kl. 09.00

Hópin av meturvørum, einans 10 kr. pr metur

-50% -30% og -20% av øllum vørum

Kom inn á gólvið og ger kvettið

SONJA DESIGN

Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979

*Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.*

*Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Innlendismálaráðið.*

*Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.*

*Dagliga virksemi hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum.*

*Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um bert fer fram í samsvari við lógina.*

*Av øðrum uppgávum kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skáseting og víðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.*

*Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.*

*Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða løggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.*

## Fulltrúi til Dátueftirlitið

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til 3/4-tíðar starv til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum at byrja sum skjótast.

**Uppgávur**
Viðkomandi hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum. Arbeiðsuppgávurnar eru fjøllbroyttar og fevna um málsviðgerð, vegleiðin og ráðgeving, fundarfyrireiking og luttøku á ráðsfundum, umframt kunnandi virksemi herundir dagføring av heimasíðu við kunnandi tilfari og gera ársfrágreiðing.

**Faklig førleikakrøv**
Krav er, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærusetri innan samfelagsvísindi so sum løgfrøði, útbúgving innan almenna fyrisiting ella líknandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Viðkomandi skal hava hug og evni at arbeiða sjálvstøðugt og evni skrivliga at málbera seg lýtaleyst á føroyskum. Kunnleiki til edv á vanligum brúkarastøði krevst.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Marionnu á Dul, fulltrúa á Dátueftirlitinum, tlf. 314763 fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Dátueftirlitinum
Tinganes
Postboks 64
FO-110 Tórshavn

og skulu vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 25. januar 2005

Hvønn dag frá kl. 17.00 - 18.30

Fimmara Surprise



Hesa vikuna:

Tournedos Choron

v/ broysknum grønmeti, ristaðari avokado og dagsins epli 98,-

RIO BRAVO RESTAURANT

TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67

· Beef & Steak House ·

www.sosialurin.fo

Sosialurin

Lesið Sosialin -tað loysir seg!